Kaj Leo Johannesen og Jóhan Dahl:

# Skulu dystast um formanssessin

**Eftir at freistin at stilla upp til formansvalið í Sambandsflokkinum var úti sunnudagin, er greitt, at tvey valevni verða til formanssessin. Jóhan Dahl, løgtingsmaður, váttar, at hann hevur latið seg stillað upp í kapping við sitandi floksformann, Kaj Leo Johannesen**

FORMANSVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at formaður Sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, verður ikki afturvaldur uttan atkvøðugreiðslu á aðalfundi Sambandsfloksins, sum verður í Læraraskúlahøllini í Havn komandi fríggjakvøld.

Fýra limir í Sambandsflokkinum, Poul Martin Rasmussen úr Norðoyggjum, Atli Hansen úr Eysturoy, Hans Sigvard Hansen úr Norðurstreymoy og Jan Haldansen úr Suðuroy, hava stillað Jóhan Dahl, løgtingsmann, upp til formansvalið.

Hetta var greitt eftir, at freistin at stilla upp til valið var úti sunnudagin.

Formaðurin í Sambandsflokkinum er samstundis formaður í landsnevnd floksins.

### Jóhan váttar

Jóhan Dahl, løgtingsmaður, váttar, at hann eftir áheitan frá nevndu limum hevur latið seg stillað upp til formansvalið, men hann sigur seg í løtuni ongar viðmerkingar hava til avgerðina.

Kaj Leo Johannesen, løgtingslimur og verandi floksformaður, sigur, at hann í morgun fekk endaliga at vita, at fýra limir í Sambandsflokkinum hava stillað Jóhan Dahl upp til formansvalið, soleiðis at flokkurin nú hevur tvey valevni at velja ímillum á fundinum fríggjakvøldið.

Lesið annars viðmerkingar hjá Kaj Leo niðari á hesi síðuni.

### Eingin viðmerking

Atli Hansen, sum er millum stillararnar hjá Jóhan Dahl, sigur seg onga almenna viðmerking hava til málið.

– Nei, eg haldi ikki, at eg fari at gera nakrar viðmerkingar til málið. Nú er stillað upp, og eg haldi, tað tænir sakini best, at friður er um málið, til valið verður fríggjakvøldið.

Hann vísir á, at sjálvandi er eitt slíkt mál áhugavert fyri fjølmiðlarnar.

– Eg havi mínar meiningar um uppstillingina, men eg haldi ikki, at eg fari at úttala meg alment um tað, sigur hann.

Atli vísir á, at sambært viðtøkum floksins kunnu limirnir í Sambandsflokkinum stilla løgtingslimir upp til formansvalið, og tað er tað, sum hesir fýra limirnir hava gjørt.

– Jóhan Dahl hevur játtað at lata seg stillað upp til valið, sigur Atli Hansen.



*– Eg havi mínar meiningar um uppstillingina, men eg haldi ikki, at eg fari at úttala meg alment um tað, sigur Atli Hansen, sum er ein av fýra, ið hevur stillað Jóhan Dahl, løgtingsmann, upp til formansvalið í Sambandsflokkinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Fríggjakvøldið verður avgjørt, hvør av hesum báðum, Kaj Leo Johannesen ella Jóhan Dahl, er formaður í Sambandsflokkinum og í landsnevnd floksins, tá ið fundur er lokin*

### FAKTA UM ATKVØÐURÆTT

Helgi Abrahamsen, skrivari í Sambandsflokkinum, sigur, at skipanin við formansvali á landsfundi Sambandsfloksins er hon, at valfeløgini, sum eru sjey í tali, hava hvør sínar fimm atkvøður, Ungmannafelagið Samband hevur somuleiðis fimm, starvsnevndin hevur 3, og síðan hava løgtings- og landsstýrismenn floksins hvør sína atkvøðu. At enda hevur kassameistarin í Sambandsflokkinum eina atkvøðu.

Skrivarin váttar, at tað eru fýra limir í Sambandsflokkinum – og ikki fýra valfeløg, sum hava stillað Jóhan Dahl upp til formansvalið fríggjakvøldið.

Helgi Abrahamsen hevur onga viðmerking til valið, sum verður í flokkinum, men heldur, at tað er óheppið, um formaðurin verður skiftur út ov ofta.

Kaj Leo Johannesen hevur sitið sum formaður í Sambandsflokkinum og í landsnevnd floksins í tvey ár.

---

Kaj Leo Johannesen, floksformaður:

# – Mær dámar kapping

**– Tað er ein demokratiskur rættur at lata seg stilla upp til formansval í Sambandsflokkinum, og eg renni ikki undan kapping, sigur Kaj Leo Johannesen, sum skal dystast ímóti Jóhan Dahl, løgtingsmanni, um formanspostin í Sambandsflokkinum fríggjakvøldið**

FORMANSVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Eg haldi, at tað er í fínasta lagi, at onkur annar vil royna seg sum valevni. Hetta er ein demokratiskur rættur, og eg haldi, at tað er sunt við kapping*

– Tá ið tú fert upp í politikk, kennir tú treytirnar. Ein av hesum treytum er, at tú kanst vænta kapping, serliga tá ið tú situr ovast á rókini.

Tað sigur Kaj Leo Johannesen, sum hevur verið formaður í Sambandsflokkinum og í landsnevnd floksins seinastu tvey árini.

Spurdur, um hann er spentur til landsfundin fríggjakvøldið, sigur hann:

– Nei, undarligt nokk eri eg ikki serliga spentur enn, men tað man fara at koma.

Hetta verður helst, sum til ein fótbóltsdyst. Spenningurin man fara at veksa, so hvørt sum dagarnir ganga, og tá ið dagurin kemur, verður spenningurin helst í hæddini

### Góður fundur

Tað var ikki fyrr enn í morgun, at Kaj Leo endaliga fekk at vita, at Jóhan Dahl, løgtingsmaður, hevur latið seg stilla upp til formansvalið í flokkinum.

Hann sigur, at Sambandsflokkurin hevði ein góðan og konstruktivan landsnevndarfund næst síðsta leygardag, har valfeløgini vóru umboðaði.

– Tá hevði eg ongan varhuga av, at limir ella valfeløg vóru ónøgd við formannin og arbeiddu við at stilla annan løgtingslim upp til formansvalið.

Kaj Leo sigur, at soleiðis, sum hann skilti landsnevndarfundin, hevði hann stóran stuðul í flokkinum sum floksformaður.

– Og tó; eg haldi, at tað er í fínasta lagi, at onkur annar vil royna seg sum valevni. Hetta er ein demokratiskur rættur, og eg haldi, at tað er sunt við kapping.

### Sunt fyri flokkin

Spurdur, hvørjar møguleikar hann heldur, at mótvalevnið hevur, sigur Kaj Leo:

– Nei, tað dugi eg slett ikki at meta um, tí man veit jú ongantíð, hvør stendur aftanfyri eina slíka avgerð.

Floksformaðurin heldur, at eitt spennandi val stendur fyri framman, og hann er til reiðar at taka kappingina upp.

– Men á nevnda landsnevndarfundi merkti eg sum sagt als einki til nakra ónøgd. Tað var heldur tvørtur ímóti. Vit høvdu ein góðan og positivan fund, har vit eisini tosaðu um 100 ára dagin hjá flokkinum, sum verður 18. august í ár.

At enda heldur Kaj Leo Johannesen, at tað verður meira spennandi, nú eitt mótvalevnið er til formansvalið í flokkinum, sum verður á landsfundinum fríggjakvøldið.

– Eg eri ikki kendur sum tann, ið rennur undan kapping, og eg haldi, at hetta er bara sunt fyri flokkin, sigur floksformaðurin.